Framhald av síðu 11

hótta, berst hon menniskjum fyri í dreymum, sum merki fyri tí heild ella sálarligu heilskapan, ein innast inni tráar eftir.

Um vit nú snúgva okkum aftur til Ballard, so kundi tað lønt seg — áðrenn vit venda aftur til mandalamerkið — at sagt eitt sindur um fyribrigdið entropi, sum varð nevnt í øðrum parti av hesi viðgerð. Tann danska-føroyska orðabókin lýsir tað sum tað "at evni í læstari skipan verður javnheitt allastaðni, tá ið eitt sindur er fráliðið". Tað kann eisini lýsast sum ein gongd, í afturlatnari skipan, frá minni til vaksandi óskil, óbøtilig, tí sambært aðru termodýnamisku lóg veksur, sum tíðin gongur, entropiin. Um stuttsøgan "Tíðarinnar urtagarður" er eitt líknilsi um entropi, so umboðar harkaliðið av mentunarloysingum tíðarinnar eirindaleysu, entropisku gongd, sum at enda fer at hava við sær, at tað hástig av mentan og skili, sum Axel greivi og kona hansara umboða, moyrknar og forgongur. Hesa somu útjavnan og barbarisering síggja vit í "Tíðarinnar røddum" og "Endastrondini". Mandalamyndin kann takast sum ein roynd at lofta sær í hesi trongstøði, at — sum J.G. Ballard einastaðni tekur til — "fáa frið í lag við alheimsins ósæddu maktir", ella, orðað øðrvísi, sum mysticistisk bjargingarbeltir, virkað til av andum og heilum, sum — í samanrenningini við kosmos — hóma okkurt slag av tilveruligum framhaldi, handan øll entropisk ragnarok.

Mandalamyndin er, í ritverkinum hjá Ballard, bara eitt av mongum dømum um tann fjórða ímyndabólkin í hansara ferfalda súmbolheimi, ímyndir, sum vísa til ævinleikan. Onnur dømir eru eitt nú gimsteinar og, fyrst og fremst, krústallir. Vit hava longu víst á, hvussu krústallblómurnar í "The Garden of Time" megna at beina burtur tíðarinnar asymmetri og reka ta entropisku flóðina aftur. Eitt stórfingið dømi um ein ímyndaheim av sama slag er søgan "The Illuminated Man" frá 1964. Tað vísindaliga støðið undir søgugongdini er, sum ofta í framtíðartekstum, dømi um *eftirgjørdan vitskap*, har tann vísindaliga frágreiðingin tykist eftirfarandi og sannførandi, men í grundini bara er eitt eiti, skaldskapur latin í vísindaliga skykkju. Í søguni verður greitt frá, hvussu "dupultar galaksur" í Andromeda stjørnutyssinum hava við sær, á jørðini, eitt fyribrigdi, ið rópast Hubble-árinið ella Rostov-Lysenko-syndromið. Avleiðingin av hesum er at "tilfar, sum verður ovurmettað í einum kvantfloymi av tømdari tíð, kemur til sjóndar í parallellum rúmligum formum", so at fólk, fenaður og gróður verða takt av einum vaksandi jaðuri av krústalliseraðari atom- og molekýleftirgerð. Høvuðspersónurin í søguni, sum er vísindaligur blaðmaður, vitjar eitt av teimum vanlukkuraktu økjunum og fær høvi til at eygleiða tilgongdina, har trø og dýr, alt meðan tíðin "lekur burtur", verða takt av krústallum, til náttúran minnir um eina glitrandi dómkirkju. Inn í søgugongdina hevur Ballard flættað eitt trikantsdrama, har løgreglumaðurin Shelley og tann garvilli arkitekturin Marquand stríðast um ta sjúku Emereldu. Tað tykist týðiligt, tá ein lesur hesa søgu, at her er tað skaldið heldur enn sf-høvundurin, koloristurin og imagisturin heldur enn tann sosiali eygleiðarin, sum talar.

"The Illuminated Man" er eitt sjáldsamt ikon í enskari bókmentasøgu. Í hesi søgu eydnast tað høvundinum, við einum sjáldsomum ríkidømi av lýsingarorðum og navnorðum, ið lýsa formar, litir og skyggingar á krústallum, at trároyna eina ímyndaverð, fylgja henni og fáa hana at glógva kaleidoskopiskt í alsamt nýggjum brigdum. Søgan er, kundi ein eisini sagt, ein imagistisk meditatión yvir - sum tikið verður til í henni - "hjúnalagið millum rúmd og tíð", ta nýggju kosmologisku hugmyndina, sum Minkowski skapti í 1908. Og tað er eftir mínum tykki ikki ov nógv sagt, at hesar reglur, úr yrkingini *Adonais* eftir Percy Bysshe Shelley, sum koma fyri í søguni, sum heild lýsa tað besta í ritverkinum hjá J.G. Ballard, eins og tí hjá eitt nú Ray Bradbury:

Life, like a dome of many-
coloured glass,
Stains the white radiance of
eternity.

Eg dugi ikki at enda hesa viðgerð uttan at nevna eina aftrat av høvuðssøgunum hjá Ballard. "The Sound-Sweep" (Ljóðsópari), 1960, er dømi um ein vísindasøguligan tekst, har meira siðbundin viðurskiftir, eitt nú tey klassisku krøvini til søgugongdina, og tann rúmliga ella trídimensjónala persónslýsingin, ganga fram um teir sf-søguligu tættirnar. Evnið í hesi søgu er tann svikaligi vinskapurin millum eina gloymda, beiska operasangarindu og ein dumban dvørg. Madame Gioconda, ein Maria Callas, fallin til drykkjuskap og rúsevnir, droymir um eina ferð enn, við síni rødd og sínum persónleika, at leggja ta stóru operahøllina fyri føtur sínar. Dvørgurin Mangon — tann einasti, ið elskar hana — ger av at fáa í lag, at hennara ætlan verður til veruleika. Tá ið hann at enda verður svikin, og særdur, tekur hann eina ræðuliga hevnd. Søgan um ta fúnaðu, hysterisku divuna og tann einsamalla dvørgin er førd í mál við fynd, sannførandi menniskjalýsing og formligari elegansu.

Til endans fari eg stutt at tríva í aftur tann ævisøguliga tráðin, sum varð sleptur í fyrsta parti av hesi viðgerð. Eftir at hann í 1964 var blivin einkjumaður, varð J.G. Ballard búgvandi í Shepperton. Tey trý børnini, hann átti við Mary, aldi hann upp, hjálptur av "hjartagóðum kvinnum". Tann seinasta mansaldurin hevur hann verið ógvuliga virkin sum rithøvundur, og frá at vera útjaðaraskald er hann í dag viðurkendur sum ein týðandi — umenn eitt sindur óvanlig - rødd á tí enska bókmentaliga pallinum. Umframt at skriva stuttsøgur og skaldsøgur hevur hann virkað sum ummælari fyri bløð sum *The Guardian, The Observer* og *The New Statesman.* Flogið er vítt, og Ballard ummælir eitt nú bæði bókmentir, myndlist og vísindalig verk. Í 1997 kom *A User´s Guide to the Millennium,* eitt savn av ummælum og greinum.

Men tað er sjálvsagt í sínum fagurbókmentaliga verki, rithøvundurin og stílmeistarin J.G. Ballard blómar. Tá ið undirritaði í hesum essay havi valt at viðgera hansara stuttsøgur, er tað tí hetta eru teir tekstir, ið siga mær mest. Í fjør kom bókin *The Complete Short Stories,* eitt savn, sum fatar um 96 stuttsøgur á 1189 síðum. Í innganginum sigur Ballard, sipandi til Borges, Bradbury og Poe, at stuttsøgan, tá hon er best, er "myntað úr dýrmætum metali, ein glampi av gulli, sum lýsir um ævir í hugflogsins djúpa pungi", og hann ber hana saman við ta drúgvu skaldsøguna, ið ikki so sjáldan er "eitt yvirmett gjaldoyra, sum mangan vísir seg at vera falskur myntur". Metingin hóskar eftir mínum tykki væl til tær bestu søgurnar í hesum savni. Tað eru kortini ikki bara tað ríka tematiska universið, tann merkiligi transcendentali longsulin út úr rúmd, tíð og entropiskum tronga og tann glógvandi ímyndaheimurin, sum gera hetta savn til eitt tað besta søgusavnið í enskum bókmentum. Uppaftur størri týdning hevur tað ballardska skrivingarlagið, eitt ljóðfall sum er eyðkent, ein málburður og ein myndaheimur, sum — eins og heilsaðust her Graham Greene og Salvador Dali - tykjast at fata um bæði tað neyva og dapra og tað glógvandi og heraldiska, stranga dystopi og surrealistiskt glámlýsi.

J.G. Ballard: The Complete Short Stories. 490 SEK. Flamingo. London 2001. Teir báðir fyrru partarnir av hesum essay stóðu í Sosialinum tann 6. Og 13. apríl.

whazzzup!!!

Forrige | Næste | Svar | Svar alle | Videresend | Flag | Udskriv | Rediger | Slet | Ombryd igen | Udkast

TELDUBRÆVIÐ

Frá: Rúnar Reistrup, Árhus, runar@reistrup.com
Til: turid@sosialurin.fo
Evni: Vikuskifti

Útflutningur av skúlagjaldi

Í vikuni frættist, at sonevndi ÚSUN stuðulin, ið verður latin til skúlagjald hjá føroyskum lesandi uttan fyri Norðurlond, varð hækkaður til 120.000 krónur um árið.
Sum lesandi føroyingur í Danmark kann eg ikki annað enn fegnast um at fáa so góðar sømdir, og um at allir aðrir føroyingar hava sama møguleika. Hetta eru sømdir, sum mínir dansku lestrarfelagar ikki so mikið sum droyma um og neyvan høvdu trúð, um eg segði teimum tað.
Tað fari eg tó ikki at gera, so leingi teir vita, hvørjum eg fái mín útbúgvingarstuðul frá.
Tí 120.000 krónur árliga eru nógvir pengar. Sum er, koma bert einar hálvtrýss umsóknir um ÚSUN stuðul árliga, og tá er upphæddin yvirkomilig.
Um talið á føroyskum lesandi uttan fyri Norðurlond hinvegin fýrfaldast nú tað í roynd og veru er ókeypis at ganga á einum og hvørjum hægri skúla í øllum heiminum, so kostar skipanin knappar 25 milliónir krónur í útlendskum skúlagjaldi um árið.
Men so leingi danskir skattgjaldarar gjalda fyri bæði skúlar og stuðul til teir umleið 1100 føroyingarnar, sum taka hægri útbúgving í Danmark, eru útreiðslurnar, sum Føroya land ber av sínum lesandi, kortini lutfalsliga lágar.
Tann stóri spurningurin er bara um íløgan ikki kundi verið løgd í onnur og meira fruktbar stað í føroysku útbúgvingarskipanini.
Tí tað, sum verður útgoldið í ÚSUN stuðli er jú skúlagjald, og skúlagjald er sum kunnugt gjald til skúlar. Føroya land er við øðrum orðum við til at gjalda eina upphædd til hægri lærustovnar uttanlands, sum skjótt kann vaksa til fleirfalt tær smáu 14 milliónirnar, sum landið árliga letur til sítt egna universitet, Fróðskaparsetrið. Er tað smart, ella er tað eitt slag av pissaíbuksloysn.
Her í Danmark hava tey lesandi á hægri lærustovnunum, eisini vit 1100 føroysku donsku lesandi, ríkar møguleikar til at fara á góðar lærustovnar um allan heim, uttan at noyðast at gjalda skúlagjald. Hetta er gjørligt, tí at hægru lærustovnarnir hava avtalur um at senda eitt ávíst tal av lesandi ímillum sín.
Men áðrenn ein hægri lærustovnur kann gera slíkar avtalur við aðrar, má hann hava nakað at bjóða hinum lærustovnunum í heiminum.
Kanska hevði tað verið betri at ment Fróðskaparsetrið í nóg stóran mun til, at tað bar til at lata føroysk lesandi fáa ókeypis pláss á lærustovnum aðrastaðni í heiminum afturfyri at lesandi aðrastaðni frá fingu pláss á eitt nú Fróðskaparsetrinum.
Kanska skuldi peningur heldur verið lagdur í hægri lærustovnar í Føroyum enn í lærustovnar í øðrum londum.
Kanska hevði tað verið betri og bíligari í longdini.

Føroyingar!

Vilja tit hava, at onki skal henda komandi fýra árini?
*Veljið so blokkpolitikkin! *)*

Vilja tit í staðin hava:

- ◊ **Ansingartrygd**
- ◊ **at tað skal vera lættari at seta Búgv**
- ◊ **Eftirløn til øll**
- ◊ **ein munadyggan Eldra- og Familjupolitikk**
- ◊ **ein betri Fólkaskúla**
- ◊ **Førleikamenning á øllum økjum í vinnulívinum**
- ◊ **eina einfaldari Landsumsiting**
- ◊ **trivnað í Lokaløkjunum**
- ◊ **ein fjølbroyttan Mentanarpolitikk**
- ◊ **Sjálvbjargni, framburð og Sjálvstýri**
- ◊ **framhaldandi útbyggingar á Sjúkrahúsøkinum**
- ◊ **minni Skattatrýst á miðalinntøkurnar**
- ◊ **eitt reinari og vakrari Umhvørvi**
- ◊ **eina góða framtíð fyri tey Ungu**
- ◊ **betri Útbúgvingarmøguleikar**

So eiga tit heldur at velja Sjálvstýrisflokkin!

Sjálvstýrisflokkurin

- ger góðar tíðir betri

www.tingakrossur.fo

**) Polarisering*

Læruplass hjá Rasmussen og Weihe

Vit kunnu ikki lova tær pláss á landsliðnum…

… men eftir summarfrítíðina hava vit tvey læruplass tøk. Og hjá R&W hava vit eisini **eitt dugnaligt og væl samanspælt lið.**

At grannskoða varð fyrr mangan hildið at vera eitt keðiligt arbeiði, har ein bara sat og stardi at tølum. Í dag virkar grannskoðarin ofta sum ráðgevi, og við sínum heildarinnliti í viðurskifti kundans kann hann veita virðisskapandi ráðgeving.

Umframt at grannskoða skal grannskoðarin í dag eisini kunna geva ráð um **fígging, management, skatt, roknskap o.a.** Hetta krevur bæði praktiska og teoretiska útbúgving. Tað er eisini neyðugt at hava góðan kunnleika bæði til vinnulívið sum heild og alment virksemi og stovnar.

Jú, grannskoðan er í roynd og veru **spennandi,** og ein útbúgving hjá okkum gevur sera **góðar framtíðarmøguleikar.**

Vit bjóða tær eitt læruplass, har tú fyrst kanst lesa HD. Tað merkir, at tú vinnur pening, samstundis sum tú fært eina hægri útbúgving.

Ætlar tú tær víðari eftir HD, **eru møguleikarnir fleiri.** Tú kanst t.d. lesa cand. merc. aud. sum sjálvlesandi, samstundis sum tú arbeiðir hjá okkum. Tú kanst eisini lesa cand. merc. aud. sum fulltíðarlesandi í Danmark - tú kanst fáa farloyvi, og kanska kunnu vit útvega tær arbeiði í lestrartíðini hjá PricewaterhouseCoopers í Danmark.

Aftan á cand. merc. aud. er møguleiki at gerast statsautoriseraður grannskoðari. Hevur tú **vilja og evni,** stuðla vit tær sjálvsagt í at fullføra tað, tú setir tær fyri.

Vit vænta, at tú hevur tikið ella tekur students-, HF- ella HH-prógv í summar, og at tú ert áhugað(ur) í eini búskaparligari útbúgving. Tú hevur hug at sameina eina teoretiska útbúgving við eina praktiska útbúgving. Eisini heldur tú tað vera spennandi at sleppa **at virka í vinnulívinum.**

Størvini skulu setast eftir summarfrítíðina, men longu nú kunnu vit gera eina setanaravtalu. Ynskir tú aðrar upplýsingar, kanst tú ringja til okkara og seta teg í samband við Ole Guldborg Nielsen ella Klaus Rasmussen.

Skrivlig umsókn við prógvum og øðrum upplýsingum skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 27. apríl .

RASMUSSEN & WEIHE
STATSAUTORISERAÐ GRANNSKOÐARAFELAG P/F
An associated firm of
PRICEWATERHOUSECOOPERS
Á Glaðsheyggi · Box 30 · FO-110 Tórshavn
Tel. (+298) 31 10 17 · Fax (+298) 31 10 18
E-mail: rasmussen@rasmussen.fo · http://www.rasmussen.fo